FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn,

J.Nr.: 19/00344

Svar upp á fyrispurning nr.2/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um bussleiðina millum Vágar og høvuðsstaðin, settur landsstýrismanninum í samferðslumálum Jørgeni Niclasen

1. Fer landsstýrismaðurin at tryggja, at ferðaætlanin hjá Bygdaleiðum verður broytt, so næmingar, sum ganga á Glasi og búgva í Vágum, smidliga sleppa til og frá skúla?

2. Fer landsstýrismaðurin somuleiðis at endurskoða ferðaætlanina millum Vágar og høvuðsstaðin við atliti at ferðing til og frá arbeiðsplássum?

Svar:
Samgongan vil, at øll skulu hava møguleika fyri at taka eina gymnasiala ella yrkisrættaða útbúgving, og at allar umstøður skulu verða í lagi í hesum sambandi. Millum annað skal tað verða høgligt at ferðast millum heim og skúla, og er ein góð ferðaætlan ein týðandi partur av hesum.
Landsstýrismaðurin fer at royna at finna eina loysn, soleiðis at ferðaætlanin hjá Bygdaleiðum passar betur við skúlagongdina á Glasi. Bygdaleiðir høvdu í vár, í samstarvið við bussleiðina hjá Tórshavnar kommunu, eina royndartíð har leið 300 flutti fráferðina av Farstøðini 5 min, soleiðis at leið 300 møtti Ringleiðini hjá Tórshavnar kommunu, uppi á Hálsi kl. 15.31. Og fer landsstýrismaðurin at tryggja, at henda skipan heldur fram, soleiðis at samanhangur verður millum ferðaætlanina hjá Bygdaleiðum og Glasir. Leggjast skal tó afturat, at tað er umráðandi at ringleiðin hjá Tórshavnar kommunu yvirheldur teirra ferðaætlan fyri at skipanin skal virka til fulnar.

Tinganes • Postsmoga 2039 • FO-110 Tórshavn
Telefon: + 298 35 22 00 • Telefax: + 298 35 22 01 • E-mail: FMR@FMR.FO

Í vár bleiv koyringin hjá Bygdaleiðum boðin út, og Strandfaraskip Landsins eru í samráðingum við teir busseigarar, sum vunnu útboðið. Undir samráðingunum er møguleiki fyri at gera tillagingar í ferðaætlanunum, so hesar passa betur við skúlar og arbeiðspláss. Hetta fer landsstýrismaðurin at biðja Strandfaraskip Landsins taka við í samráðingarnar.

Tinganes, 14. oktober 2019

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum